## Føroyskur dansur í Keypmannahavn

Dansifelagið Fótatraðk heldur til í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Endamálið hjá felagnum er at samlast um tann føroyska dansin. Dansað verður annað hvørt sunnukvøld kl. 18.00 frá fyrst í februar til mai. Síðan er summarsteðgur og byrjað verður aftur fyrst í septembur mánaði og dansað verður til desembur. Umframt tey føstu dansikvøldini er Fótatraðk eisini við í Mentanarnáttini í Keypmannahavn og á Bornholm og aðra staðni, tey hava eisini verið í Føroyum á Landsdansistevnu. Felagið gevur eisini eitt blað út fýra ferðir árliga. Tað er Theodor E. D. Olsen, Ið er blaðstjóri á blaðnum.



## Javnakalendarar eru framvegis eftir

Nógv vóru hørm um, at tey ikki vóru heima, tá árligi Javna kalendarin var seldur hurð til hurð undan jólum. Tey flestu halda óivað, at kalendarin nú er útseldur, tí einki hevur verið at hoyrt, síðani selt varð. Og tað er eisini harmiligt hjá Javna, sum fær ein stóran part av fíggingini til virksemi sítt frá søluni av kalendaranum. Men Lis Eklund í Niðristovu, forkvinna í Javna, sigur, at tað framvegis eru kalendarar eftir. Til ber at keypa kalendaran við at venda sær til skrivstovuna hjá Javna.




## Nógv kann gerast

**Finnur Helmsdal viðgongur, at veljarakanningin ikki sær nakað serligt út fyri hansara viðkomandi, men – sum hann sigur – enn eru ikki alla súður syftar**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Veljarakanningin í Sosialinum fríggjadagin hevur uttan iva loypt hvøkk á nógvar politikarar. Kanska serliga teir í miðstaðarøkinum.

Kanningin sær ikki so gott út fyri politikarar í Havn. Minst fimm av høvuðsstaðarpolitikarunum koma ikki inn aftur sambært kanningini.

- Eg dugi ikki at siga, hvussu eftirfarandi hendan kanningin er. Fyri mítt viðkomandi havi eg verið lítið frammi og havi lýst lítið. Nú skal eg so í sjónvarpið í kvøld, so tað er møguligt, at tað fer at gera mun, sigur Finnur Helmsdal.

Hann sigur, at hann veit ikki, hvussu nógv ein skal leggja í eina slíka kanning, tí mann skal minnast til, at tað er ein heil vika eftir til valið.

- Hinvegin skal mann heldur ikki ignorera eina slíka kanning, men nógv kann sum kunnugt henda upp á eina viku, sigur Finnur Helmsdal, sum annars ikki hevur tær nógvu viðmerkingarnar til veljarakanningina, sum bert gevur tingmanninum 0,5% av atkvøðunum hjá Tjóðveldi.



*Finnur Helmsdal fær sambært kanningini lítla undirtøku. Men enn er long tíð til valið*

# Hugsa longur enn tvær vikur

**Tað eru ikki bert seinastu tvær vikurnar, ið telja. Eg vóni, at veljarin hyggur at tí, ið avrikað er hetta valskeiðið, og samstundis hugsar fram, sigur Kristian Magnussen**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Kristian Magnussen vónar, at fólk hugsa seg um*

Javnaðarflokkurin stendur at missa ein mann í Suðurstreymi – men stendur samstundis til at vinna tvær kvinnur á ting í sama øki.

- Í grundini er tað so einfalt, at verði eg ikki valdu inn aftur, so er tað tí, at veljarin ikki hevur nóg stórt álit á mær, sigur Kristian Magnussen.

Hann sigur, at tað er so ymiskt, sum fólk føra valstríð. Summi eru nógv frammi, summi minni, og summi brúka nógvan pening, onnur minni.

- Eg haldi, at eg fari at biðja fólk um at hugsa longur aftur enn eina ella tvær vikur, sigur Kristian Magnussen.

Hann heldur seg síggja tendensir í kanningini sum benda á, at hon skal takast við fyrivarni. Hann trýr lítið upp á, at hvørki Óli Breckmann ella Bjarni Djurholm sleppa á ting aftur. Men í síðsta enda koma tey inn, sum veljarin hevur størst álit á.

- Eg vóni bara, at fólk hugsa seg um. Eg vóni tey minnast, hvat er komið av skafti hetta valskeiðið. Tað er so nógv, man hevur verið við til at bygt upp, men eisini nógv, sum mann hevur verið við til at varðveitt, sigur Kristian Magnussen.

- Tí tað ræður ikki bert um at bróta burtur úr nýggjum, men eisini at varðveita tað, sum vert er at halda fast um. Vit forðaðu eitt nú fyri, at rentustuðulin varð avtikin, og tað er eitt dømi um nakað, ið vit eiga at varðveita, sigur Kristian Magnussen.

Hann heldur ikki, at hansara støða til Føroyar sum eitt valdømi hevur skatt hann nakað.

- Eg havi kanska mist eitt sindur av teimum gomlu atkvøðunum, men so fái eg vónandi nakrar nýggjar í staðin fyri, sigur Kristian Magnussen.

# Úrslit síggjast aftur

**Eg havi nógv úrslit at vísa á seinasta valskeið, og tí undrar tað meg, at eg ikki komi upp á listan í hesi veljarakanningini, sigur Bjarni Djurholm**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sambært veljarakanningini, sum stóð í Sosialinum fríggjadagin, fær eingin av teimum trimum ting- og landsstýrislimunum í Suðurstreym hjá Fólkaflokkinum afturval. Og tað undrar Bjarna Djurholm nakað.

- Nú skal mann ikki taka eina veljarakanning fyri meira enn tað, hon er. Men sæð í ljósinum av tí, sum er avrikað seinasta valskeiðið kundi eg rokna við, at komið longur upp á listan, sigurBjarni Djurholm.

Hann vísir á, at hann var fyrst valdur til løgtingsvalið seinast, og tí skuldi tað undra, um avrikini ikki munnu fara at síggjast aftur í síðsta enda.

- Tað kundi verið nevnd so ómetaliga nógv mál, sum eru loyst úr lagdi hetta valskeiði, og sum hava ovurstóran týdning fyri meningina av øllum samfelagnum. Hugsa bara um vegakervið, hvussu nógv tað er útbygt. Og tær privatiseringarnar, sum eru farnar fram. Vit hava brotið burtur úr nýggjum við børsskráseting av føroyskum fyritøkum. Skuldi eg nevnt øll málini hevði eg næstan ikki blivið líðugur, sigur Bjarni Djurholm.

Langi listin við málum, sum eru avgreidd undir hesi samgonguni, fer at telja í síðsta enda, væntar Bjarni Djurholm.

Fólkaflokkurin hevur en kjarnuskara av veljarum, sum er trúgvur, og tað skal verða løgið, skuldi eg mist so nógvar atkvøður frá seinasta løgtingsvali, sum hendan kanningin bendir á, sigur hann.

- Tað er eisini so mikið av óvissu í kanningini, at eg ikki missi móti av hesum, heldur tvørtur ímóti. Tað ræður jú um hjá teimum, sum liggja á vippuni í kanningini at renna tað skjótari, sigur Bjarni Djurholm.



*Bjarni Djurholm hevur góðar vónir, hóast veljarakanningin ikki gevur honum sess á tingi*

# ES kann ikki bíða

**Skulu vit, sum Høgni Hoydal mælir til, bíða eftir fullveldi, fyri at fara upp í ES, mugu vit bíða í minst 50 ár. Men vit hava brúk fyri at koma upp í ES nú, sigur Jóhan Dahl**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Tað tykist, sum Høgni Hoydal liggur og skvatlar í sínum egna politiska dunnuhyli. Tað sigur Jóhan Dahl úr Sambandsflokkinum.

Hann sigur, at einasti máti at sleppa upp í ES við verandi støðu, er ígjøgnum Danmark.

- Og vit hava brúk fyri at koma upp í ES nú, sigur hann.

- Vit fáa undir øllum umstøðum ikki meiri ávirkan í ES, antin vit fara upp í sum sjálvstøðug tjóð ella í einum sambandsríki, sigur Jóhan Dahl.

Hann vísir á, at tað standa nógv stór lond í Europa og rópa eftir at sleppa at gerast limir í ES, lond, sum eru nógv størri og hava nógv størri týdning enn Føroyar.

- Tað er av stórum týdningi fyri menningina av vinnulívinum, fólkinum og samfelagnum sum heild, at vit beinanvegin sleppa í samráðingar við ES um treytirnar fyri limaskapi. Tað einasta, sum ræður um, er, at finna rætta leistin fyri limaskapi saman við Danmark, sigur Jóhan Dahl.

Vit mugu ásanna, at vit eru í einum ríkisfelagsskapi, og Jóhan Dahl vísir á, at skulu vit, sum Høgni Hoydal mælir til, bíða eftir einum fullveldi, áðrenn ES-spurningurin kann takast upp til viðgerðar, so koma vit at bíða í minst 50 ár aftrat. Og tað heldur hann ikki at hvørki vinna ella samfelag hevur ráð at bíða eftir.

- Tað er naivt at halda, at allir trupulleikar verða loystir, bara vit fáa fullveldi. Vit eru í einum ríkisfelagsskapi og tí ræður um at gagnnýta teir møguleikar, sum hesin ríkisfelagsskapur gevur, sigur Jóhan Dahl.



*Jóhan Dahl fýlist á, at hinir flokkarnir bara avvísa at kanna møguleikarnar fyri ES-limaskapi gjøgnum Danmark. – Vit hava brúk fyri at koma upp í ES nú, sigur hann*